# TB fullmannað til stevnudystin

Leygardagin skal TB spæla stevnudyst móti EB/Streymi, og einki er at ivast í, at tvøramenninir ætla sær eina endurtøku av sigrinum fyrr í ár.

Og til dystin hevur TB alt fólkið tókt. Óli Johannesen vandi ikki hósdagin, men tað verður tó roknað fyri vist, at hann fer at verða tøkur kortini. Og so er langtíðarskaddi Daniel Nyarko einsta fráveran.

Hjá EB/Streymi tykist støðan við fólki eisini at vera heilt góð. Í mun til seinasta vikuskifti eru bæði Ólavur Poulsen og Esmar Eiðisgarð nú aftur við í hópinum, og tað merkir eftir øllum at døma, at Egil Zachariassen og Johan á Stongum ikki eru við hesaferð.

Nú talan er um stevnudyst, verður sjálvandi steyp latið vinnaranum. Dysturin byrjar kl. 17.45.

-jm

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Formula-deildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 14 | 9 - 1 - 4 | 35 | 16 | 19 | 28 |
| 2 Skála | 14 | 7 - 5 - 2 | 29 | 16 | 13 | 26 |
| 3 B36 | 13 | 7 - 5 - 1 | 18 | 6 | 12 | 26 |
| 4 NSÍ | 13 | 5 - 5 - 3 | 20 | 16 | 4 | 20 |
| 5 EB/Streymur | 13 | 4 - 5 - 4 | 14 | 21 | -7 | 17 |
| 6 KÍ | 13 | 4 - 2 - 7 | 20 | 21 | -1 | 14 |
| 7 GÍ | 13 | 4 - 1 - 8 | 17 | 23 | -6 | 13 |
| 8 TB | 13 | 3 - 4 - 6 | 12 | 20 | -8 | 13 |
| 9 ÍF | 13 | 3 - 4 - 6 | 16 | 29 | -13 | 13 |
| 10 VB | 13 | 3 - 2 - 8 | 10 | 23 | -13 | 11 |

2. deild menn

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 7 | 6 - 0 - 1 | 29 | 4 | 25 | 18 |
| 2 FSV04 | 7 | 5 - 1 - 1 | 20 | 4 | 16 | 16 |
| 3 B71 | 7 | 5 - 1 - 1 | 17 | 6 | 11 | 16 |
| 4 AB | 7 | 4 - 1 - 2 | 17 | 14 | 3 | 13 |
| 5 HB | 7 | 4 - 0 - 3 | 21 | 15 | 6 | 12 |
| 6 LÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 27 | 19 | 8 | 9 |
| 7 Royn | 7 | 3 - 0 - 4 | 10 | 29 | -19 | 9 |
| 8 B36 | 7 | 1 - 2 - 4 | 8 | 13 | -5 | 5 |
| 9 Sumba | 7 | 1 - 0 - 6 | 15 | 32 | -17 | 3 |
| 10 GÍ | 7 | 0 - 1 - 6 | 7 | 35 | -28 | 1 |

Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FH | 7 | 7 - 0 - 0 | 18 | 2 | 16 | 21 |
| 2 Valur | 7 | 5 - 0 - 2 | 15 | 5 | 10 | 15 |
| 3 Fylkir | 7 | 3 - 2 - 2 | 12 | 9 | 3 | 11 |
| 4 Keflavík | 7 | 3 - 2 - 2 | 12 | 16 | -4 | 11 |
| 5 KR | 7 | 3 - 1 - 3 | 8 | 8 | 0 | 10 |
| 6 Fram | 7 | 2 - 2 - 3 | 7 | 6 | 1 | 8 |
| 7 Grindavík | 7 | 2 - 1 - 4 | 8 | 14 | -6 | 7 |
| 8 ÍA | 7 | 2 - 1 - 4 | 5 | 11 | -6 | 7 |
| 9 ÍBV | 7 | 2 - 0 - 5 | 6 | 16 | -10 | 6 |
| 10 þróttur | 7 | 1 - 1 - 5 | 10 | 14 | -4 | 4 |

Føroyskir leikarar: Rógvi Jacobsen (KR)

# B36 hómar oddasessin

Um árstalsfelagið úr Havn vinnur útidystin móti ÍF sunnudagin, klintra teir aftur upp á oddasessin, sum HB annars hevur havt seinastu vikurnar.

Fortreytirnar fyri hesum vórðu greiðar mikukvøldið, og tí er einki at ivast í, at havnarmenninir fara eftir øllum sunnudagin.

ÍF hevur tó eisini tørv á stigum, um teir skulu vinna seg burtur úr botninum. Til hetta krevjast mál, og tí er vónin í Fuglafirði, at Gunnar Nielsen aftur verður tøkur, eftir at hann hevur drigist við vøddaskaða í búkinum. Hartil er Fritleif í Lambanum nú aftur við eftir skaða, og eisini langtíðarskaddi John Thomsen er nú aftur farin undir venjingar. Men tað ganga nokk nakrar vikur, áðrenn hann er nóg birgur til dyst aftur.



*Ingi Højsted er saman við Mikkjal Thomassen leikbannaður, tá B36 vitjar í Fuglafirði*

Hjá B36 mugu broytingar í øllum førum gerast á miðvøllinum, har bæði Mikkjal Thomassen og Ingi Højsted eru leikbannaðir, eftir at teir móti endanum av dystinum í Vági fingu hvør sítt gula kort. Tað merkir so helst, at miðvøllurin verður samansettur av Fróða Benjaminse og Klæmint Matras, sum báðir hava skikkað sær nakað betri.

**-jm**

# Botnurin hóttir KÍ

Hóast VB í miðvikuni tapti útsetta dystin móti B36, so er tað við góðum treysti, at vágbingar nú gera seg til at taka ímóti KÍ.

KÍ er eitt av liðunum, sum er statt beint framman fyri VB, og vinna vágbingar hendan dystin, fara teir framvið klaksvíkingunum á stigatalvuni.

Hartil hava vágbingar nú aftur Milan Kuljic tøkan, eftir at hann sat leikbann av seinast.

Hjá KÍ hevur kreppurtosið stungið djúpt í ár, og sum skilst, so hevur talan eisini verið um beinleiðis kreppufundir. Og heldur ikki har ivast tey í týdninginum av einum sigri hesaferð.

Hjá KÍ er Jan Andreasen aftur tøkur eftir leikbann, og tí er væntandi, at hann fær sess í miðverjuni aftur. Hartil er Harley Bertholdsen nú aftur farin at venja, og so er spurningurin, hvørt hann longu nú verður mettur førir fyri at spæla dyst í Formula-deildini.

**-jm**



*Hjá VB er Milan Kulic nú aftur at tøkur, eftir at hann hevði leikbann seinast*

## Grannaupp gerð við Løkin

Talan plagar at vera um ferðmiklar dystir, tá GÍ vitjar við Løkin, og skal metast um týdningin av dystinum, so verður støðan tann sama sunnudagin.

Hjá NSÍ siga tey seg vera væl fyri til dystin. Eftir dystin móti EB/-Streymi bóru tey ótta fyri, at Helgi L. Petersen hevði álvarsligan skaða, men hann hevur tó vant í vikuni, og er tí helst tøkur til dystin.

Hjá GÍ er størsti missurin uttan iva, at Súni Olsen ikki er við. Móti endanum av dystinum móti HB fekk hann gult kort, og tað útloysti fyrsta leikbannið fyri hansara viðkomandi. Og Hans Pauli Petersen er úti við skaða.

Í aðrar mátar hevur GÍ tó alt fólkið tókt, og tað merkir kanska, at bæði Sámal Joensen og Magni Jarnskor verða við frá byrjan av dystinum.

**-jm**

# Rógvi bæði skoraði og legði upp

**Tá ið tað endiliga eydnaðist KR at fáa fulla úrtøku, átti føroyski landsliðsspælarin sera stóran leiklut**

ÍSLAND

*Jóannes Hansen*

Hóskvøldið eydnaðist tað KR at fáa fulla úrtøku. Í sjeynda umfari vunnu teir 3-2 á heimavølli ímóti Þrótti, og hetta var fyrsti sigurin, síðani KR vann hepnan sigur í fyrsta umfarinum.

Føroyski landsliðsspælarin Rógvi Jacobsen var ógvuliga eyðsýndur hóskvøldið. Hann var miðframherji allar 90 minuttirnar, og Rógvi skoraði fyrsta KR málið, og hann legði upp til hini bæði.

Hóast stóra yvirvág til heimaliðið, so fingu teir ikki mál, fyrrenn tað restaðu fýra minttir av fyrra umfarinum. Eftir horna var Rógvi Jacobsen hægstur og stútaði bóltin í kassan. Hetta var sætta málið, sum Rógvi hevur skorað fyri KR, og hetta var fimta ferðin, at hann nýtti skallan, sum tað verður tikið til í Íslandi.

Í síðsta minuttinum undan hvíldini økti miðvallarin Sigurvin Ólafsson til 2-0. Eftir innlegg fekk Rógvi fatur á bóltinum, sum hann so legði út frá til miðvallaran, sum sendi í netið.

So tóktist tað sum um, at heimasigurin var vísur, men eitt korter undan leikloki skoraði Þróttur tvær ferðir innanfyri tveir minuttir, og so stóð einki til hjá KR.

Men fýra minuttir undan leikloki var Rógvi Jacobsen aftur upp á spæl. Hann legði innfyri úr vinstru, og Grétar Ólafur Hjartarson sendi bóltin í netið.

Sigurin bar við sær, at KR nú hevur tíggju stig. FH, sum hesa ferð vann 2-0 á heimavølli ímóti ÍA, er oddalið við 21 stigum. Valur tapti 1-0 í Oyggjunum, men Valsmenn eru framvegis næstfremstir. Teir hava fimtan stig. Fylkir og Keflavík, sum hesa ferð spældu 2-2 í Keflavík, hava ellivu stig, og so kemur KR.

Grindavík, sum vann 1-0 á Fram í Reykjavík, hevur sjey stig saman við ÍA og ÍBV, og Þróttur er aftast við fýra stigum. 27. juni skal KR í áttanda umfarinum spæla á útivølli ímóti Vali.